UTTAN ÚR HEIMI

# Palme-morðið var eitt mistak

**Sambært vinmonnunum viðgekk Christer Pettersson, at hann myrdi Olof Palme, men at tað var eitt mistak, tí hann skuldi skjóta ein annan mann**



*Olof Palme varð skotin í miðbýnum í Stockholm tann 28. februar í 1986*

PALME-MÁLIÐ

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Christer Pettersson bleiv ákærdur fyri at hava skotið Olof Palme í miðbýnum í Stockholm um kvøldið tann 28. februar í 1986. Men hann varð fríkendur, tí løgreglan kundi ikki finna eina grundgeving fyri, hví hann skuldi hava skotið forsætisráðharran.

Men tað var kanska heldur ikki so løgið, tí sambært einum nýggjum dokumentarfilmi var tað eitt mistak, at Olof Palme bleiv skotin. Í gjár segði ein vinmaður Christer Pettersson við Aftonbladet, at tað var Christer, sum myrdi forsætisráðharran, men at tað var ikki ætlanin. Tvær vikur áðrenn hann doyði í 2004, skal Christer hava sagt:

– Eg skeyt Palme á Sveavegnum, men tað var ikki hann, eg skuldi skjóta.

Vinmaðurin, sum gongur undir dulnevninum "Rogge", sigur við Aftonbladet, at Christer ætlaði fleiri ferðir at tosa við son Olof Palme, Mårten, so hann kundi greiða honum frá tí, sum hent var, og at hann var harmur um mistakið. Men sum skilst hittust teir ongantíð.

Ein annar vinmaður Christer Pettersson, Roger Östlund, segði í síðstu viku, at hann sá Christer Pettersson skjóta Palme, men at tað var eitt mistak.

– Hann skuldi skjóta rúsevnasølumannin Sigge Cedergren, sigur Roger Östlund.

Roger Östlund sigur tað sama í nýggja dokumentarfilminum "Tað skeiva morðið", sum svenski tíðindamaðurin Mikael Hylin og danski filmsmaðurin Lasse Spang Olsen hava gjørt. Í filminum kemur eisini fram, at svenska rúsevnaløgreglan var uppi í málinum, tí ein løgreglumaður hevði fjalt spor, sum kundu seta Palmemorðið í samband við eina uppgerð í rúsevnaumhvørvinum í Stockholm.



*Christer Pettersson. Sambært vinmonnunum var tað eitt mistak, at hann myrdi Olof Palme*

## USA eggjar til mótmæli

Myndugleikarnir í Hvítarusslandi vilja vera við, at USA roynir at eggja til mótmælistiltøk í sambandi við forsetavalið har tann 19. mars.

Stjórnin í Minsk vísir á, at tá amerikanski varauttanríkisráðharrin David Kramer var í Hvítarusslandi í síðstu viku, segði hann bart út, at hvítarussar hava rætt til at mótmæla viðurskiftunum í heimlandinum. Hann skal eisini havt sagt, at USA hevur ongan áhuga í at hava góð viðurskifti við sitandi stýrið í Hvítarusslandi. Hetta er fallið stjórnini í Minsk fyri bróstið. Talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum, Andrej Popov, segði sunnudagin, at tað er bæði óvanligt og óheppið, at útlendskt stjórnarumboð eggjar til mótmæli í einum fremmandum landi.

David Kramer var í Minsk fríggjadagin, og sambært tíðindastovunum segði hann, at hann var ikki komin hagar fyri at biðja fólkið fara út á gøtuna at mótmæla, men at tey høvdu fullan rætt til at gera tað.

Tað er lítil ivi um, at Aleksander Lukasjenko, forseti, verður afturvaldur tann 19. mars, og hann hevur longu lovað, at allur ófriður í sambandi við valið verður bardur niður, skrivar NTB.

## Hon ætlar sær at verða forseti í Fraklandi

Fáa veljararnir hjá franska sosialistaflokkinum sín vilja, fer flokkurin at stilla ta 52 ára gomlu Ségoléne Royal upp á forsetavalinum, sum verður tann 22. apríl næsta ár. Meiningakanningar vísa, at teir flestu sosialistisku veljararnir vilja hava hana til valevni, meðan bara 20 prosent styðja fyrrverandi forsætisráðharran Lionel Jospin, sum eisini ætlar at royna seg.

Ségoléne Royal er er ikki nakar ársungi í fronskum politikki. Sum útbúgvin búskaparfrøðingur arbeiddi hon sum ráðgevi hjá Francois Mitterand, forseta frá 1982 til 1988, tá hon bleiv vald í tjóðartingið. Í fýra stutt tíðarskeið í árunum frá 1992 til 2001 var hon ráðharri í skúla-, umhvørvis- og trivnaðarmálum.

Ségoléne Royal er sambúgvi hjá aðalskrivaranum í socialistaflokkinum, Francois Hollande. Franskir fjølmiðlar hava skrivað, at hann ætlaði sær at stilla upp á valinum næsta ár, og at tað kom sera óvart á hann, tá Ségoléne kunngjørdi, at tað ætlaði hon eisini. Síðani hevur hann boðað frá, at hann sjálvandi ætlar sær at styðja sambúgvan upp undir valið.

## Roykjarar líða av tunglyndi

Ein norsk kanning vísir, at fólk, sum roykja, líða meiri av tunglyndi enn tey, sum ikki festa sær í.

Meiri enn 1.000 tilvildarliga vald fólk í Oslo og Lofoten hava tikið lut í kanningini, og úrslitið vísir, at tey, sum roykja illa, eru í fýra ferðir størri vanda fyri at líða av tunglyndi enn tey, sum ikki roykja. Fólk, sum roykja illa, roykja meiri enn 20 sigarettir um dagin. Roykja fólk einar 10 sigarettir um dagin, er vandin fyri tunglyndi tvær ferðir størri enn hjá teimum, sum ikki roykja.

Úrslitið av norsku kanningini stóð í tí viðurkenda amerikanska tíðarritinum American Journal of Epidemiology í januar, sigur NRK.

# Da Vinci-høvundurin skal í hægstarætt

**Tveir rithøvundar vilja vera við, at Dan Brown stjól teirra hugskot, tá hann skrivaði ta kendu bókina**

BÓKMENTIR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Dan Brown er vorðin kendur um allan heimin fyri bókina um Da Vinci-loyndarmálið, men rithøvundarnir Richard Leigh og Michael Baigent vilja vera við, at hann hevur stolið hugskotið frá teimum, og at innihaldið í bókini byggir á upplýsingar, sum teir báðir hava brúkt sjey ár um at kanna.

Teir hava tí stevnt forlagnum hjá Dan Brown eftir meiri enn 100 milliónum krónum í endurgjaldi. Forlagið noktar at gjalda endurgjald, og Dan Brown vil einki siga, og tí skal málið nú í hægstarætt. Har sleppur Dan Brown helst at svara fyri seg, tí roknað verður við, at hann verður avhoyrdur í rættinum.

Fyrr hevur Dan Brown sagt, at hann fekk hugskotið til bókina, tá hann var og vitjaði í Sevilla í Spania, har hann hoyrdi ein professara greiða frá málninginum "Tann seinasta máltíðin" hjá Leonardo da Vinci.

## Dýrur endabrestur

Í Kolombia er ein maður dømdur í húsavarðhald í fýra ár, tí hann klappaði einari kvinnu í afturpartin í tí, hann fór fram við henni á gøtuni.

Dómurin hevur elvt til nógv orðaskifti í teimum kolombisku fjølmiðlunum, og nógvir løgfrøðingar hava sagt sína hugsan um dómin. Summir teirra halda, at revsingin er alt ov hørð, men aðrir halda, at revsingin er neyðug fyri at ræða aðrar menn frá at gera tað sama.

Tær flestu kvinnurnar halda, at maðurin fekk ta revsing, sum hann hevur uppiborið, og tær siga seg vóna, at kvinnur nú fáa frið at ganga í gøtunum í Kolombia, skrivar AP.